## DM-silvur í inniróðri

Magnus D. Madsen úr Havn, sum í summar fer at rógva við Hoyvíkingi, vann leygardagin silvur í kappingini um danska meistaraheitið í inniróðri, tá hann róði 2.000 metra teinin við tíðini seks minuttir og 3,2 sekund. Hetta var fýra sekund frá vinnaratíðini, men Magnus fekk – eftir ein framúrskarandi endaspurt – somu tíð sum ein annar, so latin vórðu tvey silvurmerki og einki bronsumerki.



## Jóannes hjálpir HB

Leygarkvøldið kunngjørdi HB, at Jóannes Jakobsen næstu tvey árini skal vera hjálparvenjari hjá nýggja HB-venjaranum, Kristján Guðmundsson, sum í heyst var settur at venja Vodafone-liðið hjá føroyameistarunum. Jóannes Jakobsen hevur sín uppruna í HB, sum hann eisini fyrr hevur spælt við og vant, umframt at hann hevur verið spælari og venjari hjá feløgum sum VB, KÍ, B68, B36 og AB.

### VÍF-Stjørnan 18-29 (7-15):

# Toppurin gongur fyri seg

**VÍF var ongan tíð nær námind nakrari sensatión móti Stjørnuni, sum saman við Tjaldri bara bíðar eftir FM-finaluni**



Jákup Mørk

Tað gongur ikki nakran serligan veg at skapa spenning um tey bæði finaluplássini í Sunset-deildini.

Higar til hava hvørki Stjørnan ella Tjaldur sýnt nøkur tekin um veikleika, tá spælt hevur verið móti niðaru liðunum, og tann søgan varð endurtikin í Vestmanna sunnudagin.

Frá byrjan var tað Stjørnan, sum setti seg á dystin. Eftir fyrsta korterið stóð 2-8 á talvuni, og so var spenningurin líka sum tikin úr uppgerðini.

Eftir hetta setti Stjørnan ferðina nakað niður, men tað var ongan tíð soleiðis, at veruligur spenningur kom í.

Um knappar tvær vikur hittast somu lið í steypafinaluni, og eingin ivi er um, at VÍF hevur vónir um, at tær ta ferðina kunnu gera eitt sindur meira við mótstøðuna. Skala tað henda, so er tó eingin ivi um, at VÍF skal raka besta dagin á árinum, og so er spurningurin, hvussu fer at gangast við teirri ætlanini.

**Talan var um undansýning av steypafinaluni, og hendan bendi ikki á, at stórvegis spenningur verður í finaluni**




**FAKTA**

**VÍF-Stjørnan 18-29 (7-15)**
**10 min:** 1-5
**20 min:** 6-11
**40 min:** 11-20
**50 min:** 15-23
**Málskjúttar**
**VÍF:** Heidi Joensen 5(1), Agnas Olsen 2, Elisa Leo 2, Liljan Djurhuus 2, Rakul Joensen 2, Linda Davidsen 2, Finngerð Jensen 1, Marita á Rógvi 1, Halla Midjord 1
**Stjørnan:** Simona Petersen 9(1), Durita Ljósstein 4, Durita Christophersen 4, Joan M. Djordjevic 3(1), Valentina Suciu 3, Judit Hansen 3, Durita Mikkelsen 1, Anna Kristina Samson 1, Una Olsen 1
**Brotskøst:** VÍF 2, Stjørnan 2
**Útvísingar:** VÍF 1, Stjørnan 4
**Dómarar:** Sámal Paulason & Kári Hansen

### Neistin-Tjaldur 24-30 (9-18):

# Avgjørdu upp á 20 minuttir

**Tjaldur gjørdi sín part av arbeiðinum liðugt, áðrenn fyrri hálvleikur var lokin, og so hevði Neistin ikki tað stóra at siga**



Jákup Mørk

At kvinnukappingin er ein kapprenning, sum einvíst stendur millum Stjørnuna og Tjaldur, varð undirstrikað í høllini á Hálsi sunnudagin.

Neistin, sum er liðið, ið liggur aftan fyri oddin, megnaði í øllum førum ikki at geva nakað serligt prógv um, at tær kunnu skala fremru liðini.

Tað kann væl vera, at Neistin skoraði tey trý fyrstu málini í dystinum, men tað fekk bara ferð á Tjaldur, sum við fullari ferð setti seg á restina av fyrra hálvleiki.

Í longum løtum vórðu tær bláu bara at rokna sum statistar, og so munaði tað ógvuliga lítið, at gestirnir dempaðu ferðina heilt nógv eftir steðgin.

Kanska høvdu tær hug at dempa ferðina ov nógv, tí veruleikin er eisini, at Neistin væl kundi skapt eitt sindur av spenningi eftir steðgin.

Munurin endaði niðri á seks málum, men var tað ikki fyri fleiri teknisk mistøk og enn fleiri góðar bjargingar frá Guðrun í Lágabø, kundi heimaliðið kanska skapt nakað av spenningi í. Men júst evnið at sleppa undan ov nógvum mistøkum er vanliga eitt av eyðkennunum hjá einum oddaliði, og í so máta undirstrikaði dysturin bara tann mun, sum er.




**FAKTA**

**Neistin-Tjaldur 24-30 (9-18)**
**10 min:** 3-4
**20 min:** 5-14
**40 min:** 14-22
**50 min:** 17-28
**Málskjúttar**
**Neistin:** Katrin á Neystabø 11(5), Unnur Danielsen 5, Anja Heinadóttir 2, Rakul Augustinussen 2, Lina Andriulyte 1, Marjun F. Danberg 1, Birita Wardum 1, Unn Kragesteen 1
**Tjaldur:** Adina Petrea 9, Annika Thomsen 6, Heidi Svedal 4, Cornelia Rimbu 4(2), Mary-Ann Zachariassen 3, Alina Olaru Anghel 3(1), Jóhanna í Króki 1
**Brotskøst:** Neistin 6, Tjaldur 4
**Útvísingar:** Neistin 3, Tjaldur 2
**Dómarar:** Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen